3-31 (13-19):

# ivið ókeypis



*Tað var merkisvert, at Ingi Olsen varð hildin so nógv á beinkinum eftir steðgin. Helst vildi venjarin halda honum burturi frá eini triðju útvísing, men harvið varð liðið eisini skert*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

ast minuttirnar eftir á mál nú vóru heilt fáir í tali, so tóktist teir í Kyndli nakað lættari, hvørja ferð mistøk vórðu framd frá VÍF.

Og tá avtornaði, so var hetta eisini nóg mikið hjá Kyndli. Tier megnaðu at halda fast um leiðsluna allan vegin, og nú eru teir ájavnir VÍF í oddinum.

### Í serflokki

Og tað man eftir dystin vera lítil ivi um, at tað vóru tey bæði sterkastu hondbóltsliðini í landinum, sum vóru á vøllinum. Tekniska støði á spælinum – og harvið eisini leikferðin – var í minsta lagi ein klassa omanfyri tað, sum onnur lið hava víst hetta kappingarárið, og hartil tóktist ein brennandi stríðsvilji eisini at búgva í hvørjum einasta leikara.

Hetta seinasta gav eisini at bíta í fleiri førum. Talan var ikki um nakran óreinan dyst sum so, men neistarnir fuku ofta millum leikararnar, tá spentar støður íkomu. Útvísingarnar fyri beinleiðis kjaftaslit og alt ov ógvusligar kropstacklingar vóru eisini fleiri í tali. Verjurnar fóru allan dystin á tamb hart í mótstøðuna, men alt kortini í allar bestu meining. Ítróttarliga avrikið var snøgt sat í topp, og tá hetta kann lata seg samantvinna við somikið góðum dramatikki, sum talan var um hesaferð, so fær tað ikki verið annað enn ein fragd at hyggja at.

Og so kann eisini staðfestast, at tað í løtuni er Kyndil, sum hevur munin av hesum báðum. Fyrst og fremst, so hava teir vunnið báðar innanhýsis dystirnar higartil í ár, men hartil, so tykist grøni hópurin hava nakrar dygdir, sum teir gulu í løtuni sakna. Ikki minst hevur breiddin her nógv at siga. Við einum somikið sterkum beinki, sum tí hjá Kyndli, so ber til hjá venjarunum at fremja støðugar útskiftingar, soleiðis at leikferðin framhaldandi kann haldast høgt. Tað kann VÍF so ikki gera í løtuni. Men teir hava fleiri leikarar, sum eru á veg aftur á liðið eftir skaðasteðg, og so kann væl verða, at talan verður um enn meira spennandi uppgerðir enn hana, sum var á skránni sunnudagin.

Næstan spell, at vit nú skulu bíða fram til endan av januar mánaði, áðrenn vit aftur síggja hesi bæði liðini tørna saman. Tann dysturin verður tó neyvan minni spennandi ella avgerandi enn tann, sum varð leiktur sunnudagin. Undir øllum umstøðum man tað vera ógvuliga avmarkað, hvat liðini fara at missa av stigum móti øðrum pørtum, um innsatsurin framhaldandi fer at verða á nær námind sama støði, sum hann var tað sunnudagin.

## FAKTA UM DYSTIN

**VÍF-Kyndil 28-31 (13-19)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Áki Olsen 7(2), Agnar Joensen 7. Ingi Olsen 6(3), Sámal Joensen 4, Jákup S. Andreasen 2, Karl Johan Djurhuus 1, Harald Bjørgvin 1
**Kyndil:** Hans Áki Dal Christiansen 7(2), Høgni Klein 6, Jakob Jónsson 5, Janus Einar Sørensen 5, Josef Abrahamsen 3, Rókur Akralíð 3, Hans Arni Thomsen 1, Finnur Hansson 1
**Brotskøst:** VÍF 6, Kyndil 2
**Útvísingar:** VÍF 8, Kyndil 4
**Dómarar:** Krisian Joensen & Karstin Joensen. Høvdu eina trupla uppgávu, sum teir ikki komu heilt nóg væl frá. Serliga tí linjan ikki varð sett nóg greitt upp frá byrjan




*– Tá leikararnir byrja at dúva upp á einmansavrikini, heldur enn at koyra sum eitt lið, koma vit í trupulleikar, helt Janus Einar um støðuna, sum íkom eftir steðgin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Leikætlanin helt

**Kyndil hevði sett sær fyri, at VÍF skuldi køvast við høgari leikferð fyrstu longu løtuna**

HONDBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Ein løtu stóð hann og spruttaði eftir dystin. Einamest um dømingina, men tá vit hittu hann á orði um hetta, tóktist Janus Einar Sørensen kortini ikki vilja siga tað heilt nógva um akkurát tann partin.

– Tað er væl altíð soleiðis, tá vit spæla móti VÍF. Tú ert brennandi heitur, meðan dysturin stendur á, og tað verður bæði givið og tikið av heilum hjarta. So vit vita av, at tað verður heitt. Men tá tað er sagt, so haldi eg samstundis, at dómararnir kundu lagt eina betri linju, staðfesti hann.

Tá tosið fall inn á sjálvan dystin, staðfesti sterki strikuspælarin, at spæliætlanin hjá Kyndli var eydnast nærum til fulnar.

– Vit tosaðu um, at vit skuldu seta ferðina í topp frá fyrsta bríksli. Tann parturin eydnaðist framúr væl, og seks mál framman fyri í steðginum skuldu eisini verið nóg mikið at tryggja okkum sigurin.

Men tað var um reppið, at VÍF tók tykkum aftur. Vóru tit ikki nóg klárir til seinna hálvleik?

– Tað er sama søgan aftur hjá okkum. Tá leikararnir byrja at dúva upp á einmansavrikini, heldur enn at koyra sum eitt lið, koma vit í trupulleikar. Tað var eisini um reppið, at hetta kostaði okkum heilt dýrt hesaferð. Eisini tí at talan móti endanum gjørdist um nógv stríð og ov lítið spæl.

– Ikki tí. Stríðsvilji og harðir nærdystir hoyra til eina slíka uppgerð, og eg haldi so eisini, at áskoðararnir eisini fingu onkrar góðar detaljur. Men sum heild kundi eg ynskt mær, at okkara avrik var meira støðugt skipað ígjøgnum allan dystin, segði altso Janus Einar Sørensen at enda.